## FØÐINGAR



21. mai fingu Laila S. Jacobsen og Finn Hansen, Tórshavn, hendan drongin úr Mumbai í India. Hann er føddur 24.12.99 og eitur Árni Sarvendra Hansen.

6. juni fingu Gunn Lise Larsen og Kenneth Farstad, Ullstadsvig, Noreg, ein son. Hann var 50 cm langur og vigaði 3300 gr.

21. juni fingu Christa Blåsvær og Morten Scliemann, Aalborg, ein son. Hann var 50 cm langur og vigaði 2270 gr.

21. juni fingu Bodil og Jákup Joensen, Keypmannahavn, ein son. Hann var 38 cm langur og vigaði 1460 gr.

27. juni fingu Mildrid Jespersen, Tvøroyri, og Erhard Nybo, Eiði, ein son. Hann var 52 cm langur og vigaði 3400 gr.

27. juni fingu Jórun og Kaj Leo Johannesen, Tórshavn, ein son. Hann var 54 cm langur og vigaði 3450 gr.

28. juni fingu Anja Kass Olsen og Bogi Olsen, Nes, ein son. Hann var 56 cm langur og vigaði 3900 gr.

2. juli fingu Hanna og Gunnar Nielsen, Argir, ein son. Hann var 49 cm langur og vigaði 2505 gr.

2. juli fingu Jóhanna Jonhardsdóttir og Brynjolv Gert Nicolajsen, Skopun, eina dóttur. Hon var 50 cm long og vigaði 3080 gr.

4. juli fingu Linda Højgaard og Tórur Midjord, Fuglafjørður, eina dóttur. Hon var 55 cm long og vigaði 3900 gr.

## ANDLÁT

**30. juni**
Arna Petersen, ættað úr Kollafirði, búsitandi í Havn, 78 ár.
Margretha Petersen, Vestmanna, 85 ár.

**01. juli**
Gunnar Magnussen, Trongisvágur, 82 ár.
Eyðun Poulsen, Tórshavn, 47 ár.
Turid Mortensen, fødd Midjord, Garðsenni í Hvalba, 90 ár.

**02. juli**
Niels Juul Hermansen, ættaður úr Hósvík, búsitandi í Havn, 67 ár.

## LÆKNAVAKTIR

*Tórshavn:*
Læknavaktin tlf. 310033

*Eysturoy:*
Leygardagin 7. juli: Peter Østergaard, tlf. 448016.
Sunnudagin 8. juli: Tórmóður Stórá, tlf. 444038.

*Norðoyggjar:*
Læknavaktin tlf. 458888

*Vágar:* tlf. 332413

*Suðuroy* (norður): tlf. 371560
*Suðuroy* (suður): tlf. 373030

*Tannlæknavakt, Tórshavn*
Bráðfeingishjálp fæst leygardag, sunnudag og halgidagar kl. 13-14. Tlf. 314544.

# TILTØK

### Gudstænastur
*4. sunnudag e. trinitatis*
Havnar kirkja: Sverri Steinhólm kl. 11
Nólsoy: Bjarni Bæk kl. 12
Vesturkirkjan: Heri J. Joensen kl. 11
Kirkjubøur: Sonja Klein kl. 12
Kollafjørður: Marjun Bæk kl. 11, altargongd
Kvívík: M. R. Jacobsen kl. 12
Hvalvík: Inga P. Dam kl. 11
Gøta: Jónsvein Bech kl. 11, altargongd
Leirvík: Uni Næs kl. 11, altargongd
Hellurnar: Uni Næs kl. 17, altargongd
Eiði: Emil Olsen, kl. 10.40 skriftamál, kl. 11 messa
Skála: Jógvan Fríðriksson kl. 11
Klaksvík: Niels Pauli Danielsen kl. 11, altargongd
Mikladalur: Hans Eiler Hammer kl. 12, altargongd
Viðareiði: Elsa Funding kl. 11
Hvannasund, Elsa Funding kl. 12.15
Skopun: Jákup R. Hansen kl. 12
Tvøroyri: Ólavur Rasmussen kl. 11
Sandvík: P. M. Rasmussen kl. 12.30
Hov: E. Beder kl. 11, altargongd

### Hebron, Argir
Sunnudagin kl. 10.30: Minnismáltíð Harrans. Kl. 18.00: Cathy og Jógvan Júst Rasmussen og Heidi Guttesen, trúboðarar á Filipsoyggjunum, tala og greiða frá. Regin Guttesen syngur.

### Adventkirkjan
Leygardagin kl. 10.00: Barnabíbliutími og bíbliugransking. Evni: Harrin, rættvísi okkara. Kl. 11.00: Gudstænasta við J. V. Danielsen.

### Rhema á Hálsi
Sunnudagin kl. 11 møti.

### Ebenezer
Sunnudag: kl. 11: Breyðbróting, kl. 18.00: Evangeliskt møti og kl. 21.00: Útimøti.
Mikukvøldið kl. 20: Bønar og uppbyggingarmøti.
Heimasíðan: www.ebenezer.fo

### Katólska kirkjan
Hvønn gerandisdag kl. 17.30 messa í Kerit. Hóskvøldið kl. 19.30 Meinigheitskvøld í Mariukirkjuni. Emne: Fremmedreligionernes udfordring til kirken af i dag. Foredrag v. pastor Benny Blumensaat, om de kristnes ansvar og opgave i et multireligiøst samfund. Øll eru hjartaliga vælkomin. Leygardagin kl. 11.30 Orðsinstænasta við Kommunión í Kerit. Sunnudagin kl. 11 hámessa við Benny Blumensaat í Mariukirkjuni.

### Kirkju- & missiónshúsið á Argjum
Sunnudagin 8. juli kl. 17.30 bønarløta og kl. 18.00 møti v/ Jógvan og Dagny Højgaard.

### Meinigheitshúsið
Leygardagin kl. 16.30 bønarløta – kvinnur.
Sunnukvøldið kl. 18 møti við Suna Johannesen.

### Filadelfia, Landavegur 22
Leygardagin kl. 17 landsbøn.
Sunnudagin kl. 11 morgunmøti v/ Sam Jacobsen, kl. 18 kvøldmøti v/ Sonna Djurhuus, kl. 22 útimøti v/ Evangeliihúsinum.
Møtiskráin hjá Filadelfia sæst á heimasíðu okkara: www.filadelfia.fo

### Hvítusunnusamkoman
Yviri við Strond
Sunnudagin kl. 18 evangeliskt møti.

### Samkoman Immanuel
Sunnudagin kl. 13: Sunnudagsskúli. Sunnukvøldið kl. 17: Møti.

### Meinigheitin í Hoyvík
Sunnudagin í Hoyvíkar skúla: Eingin sunnudagsskúli vegna summarferiu. Kl. 17.30 bøn og kl. 18 møti við Egin og Oddmar. Mánakvøldið kl. 20 bønarmøti hjá Elin og Símun, Flatnagerði 10 A. Øll eru vælkomin.

### Kirkju- og missiónshúsið á Argjum
Heimasíða okkara: www.koma.fo

### Filadelfia, Sundalagið
Sunnukvøldið kl. 18 kvøldmøti v/ Sam Jacobsen.
Miðdepilin og Urtagarðurin halda summarfrí til ávikavist 22.8. og 23.8.

### Saron, Vestmanna
Sunnudagin kl. 11: Morgunmøti við Jón Miðberg. Mánakvøldið kl. 20: Bíbil- og bønarmøti.

### Missións- og ungdómshúsið á Glyvrum
Møti verður sunnudagin kl. 19.00 við Alfred Olsen. Øll eru hjartaliga vælkomin.

### Keldan í Skálafirði
Leygarkvøldið opið hús kl. 21 við Eyðun Jacobsen. Sunnukvøldið møti kl. 19 við Egil Toftegaard. Vælkomin í Kelduna. www.keldan.fo

### Lívsins Orð
Møti verður sunnudagin kl. 10.30 v/ breyðbróting. Øll eru vælkomin.

### Ørkin, Saltangará
Evangeliskt møti verður sunnudagin kl. 19.00 í Arbeiðarafelagshúsinum Hæddini, Saltangará. Gestatalari luttekur. Húsmøti verður týskvøldið kl. 20.00 hjá Anthony & Charles Johansen, Saltangará.
Øll hjartaliga vælkomin.

### Betania í Skopun
Leygarkvøldið verður útimøti kl. 21.30.
Sunnudagin kl. 11 morgunmøti.
Frítór Debes talar.
Sunnukvøldið kl. 18 útimøti.
Mánakvøldið kl. 20: Bønarmøti.
Øll eru vælkomin.

### Soli Deo Gloria
Leygarmorgunin kl. 09 bøn saman við Getsemane. Sunnudagin kl. 18 møti. Mánadagin kl. 20 bønarmøti.

### Missiónshúsið á Tvøroyri
Sunnukvøldið verður møti kl. 18 við Nimrod og Ebbu. Øll eru hjartaliga vælkomin.

### Missiónshúsið í Vági
Møti verður sunnukvøldið kl. 18.00. Øll eru hjartaliga vælkomin.

### Lymfødemfelagið
Postrúm 2113,
FO 165 Argir
Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð. Samband fæst við felagið á tlf. 448454, Fía í Túni, ella tlf. 313424, Arnhild Johannesen.

### Reyði Krossur Føroya
Sorgarlinjan svarar mánadag, mikudag og fríggjadag kl. 13-15.00 á tlf. 212380.

### Felagið Tórshavn
Útferð út í Hest sunnudagin 8. juli. Farið verður av Farstøðini kl. 8.20 og av Gomlurætt kl. 9.00. Tilmelding á Kunningarstovuni.

### Tilhaldið
í Tórsgøtu 21
*Frá 3. juli til 17. august er Tilhaldið opið mánadag-fríggjadag*
kl. 14.00-18.00.
Á ólavsøku 27., 28. og 29. juli kl. 14.00-18.00 verður framsýning av listaverkum hjá Fridtjoffi Joesnen á 1. hædd og í kjallaranum verður framsýning av úrvali av klæðum frá SIRRI. (Suðuroyar Ullvirki)
Tað er altíð ein krókur í Tilhaldinum - um tygum ikki fáast við nakað ítriv. Vit ynskja at øll skulu kenna seg vælkomin.

### AA-fundir í Havn
Reinsaríið, Tórsgøta 5: Fundir verða leygardagin frá kl. 17-18, sunnudagin kl. 11-12 og mánakvøldið kl. 20-21.

### Al-anon
fundur er hvørt týskvøld og hóskvøld kl. 20 á Vaskarínum í Tórsgøtu 5.

### AA-fundur í Eysturoy
Á Toftum hvønn týsdag kl. 20 í húsinum norðanfyri skúlan. Á Glyvrum hvønn fríggjadag kl. 20 í Hvítaskúla. (gamla læraraíbúðin).

### AA-fundir í Vágum
Fundir eru í gamla skúla í Sandavági hvørt hóskvøld og leygarkvøld kl. 19.00 (á loftinum, inngongd niðanfyri)

### Føroya Heimavirkisfelag
Postboks 1209 - 110 Tórshavn.
Teldupostur: fhf@craft.fo
Heimasíða: www.craft.fo
Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð, men samband við felagið fæst við at ringja til formannin: Nigro Hermansen tlf. 314304 / fartlf. 288304

### Spælistovan í Meinigheitshúsinum í Havn
hevur summarfrí frá 28.6. til 3.9.

### LFÚ-skrivstovan
hevur opið týsdag og hósdag millum kl. 13 og 17. LFÚ-ráðgevingin hevur opið týsdag og hósdag frá kl. 16-18.

### LISA
skrivstovan hjá Listafólkasambandi Føroya í Dj. í Geilsgøtu 1 er opin mánadag kl. 14-18 og hósdag kl. 14-20. Teldupostur lisa@lisa.fo – heimasíða www.lisa.fo



# TILTØK

### Kvinnuhúsið
svarar alt samdøgrið á tlf. 317200. Skrivstovan er opin frá kl. 10 til 17, og hósdagar til kl. 21. Ráðgevingin er hóskvøld eftir avtalu.

### Amnesty International Føroya deild
Tinghúsvegur 18, 4. hædd
Skrivstovan er opin: Mánadag, mikudag og fríggjadag frá kl. 13–17.

### Føroyskir fiskimenn uttanlands
tlf. 21 04 95.
Felagið fyri føroyskar fiskimenn í Canada, Svøríki, Danmark, Íslandi og Noregi. Limagjald 200 kr. um árið. Postgiro 57894. Fø. Sparikassi 442027-8.

### MBF
Skrivstovan er opin allar gerandisdagar millum kl. 9.00 og 16.00. Vit hava stongt vegna summarfrí frá 5. juli til 15. august.
Tlf. 317373 · Fax 310813
e-mail:
mbf@post.olivant.fo

### Javni
Skrivstovan er stongd vegna summarfrí. Ringjast kann til ein av nevndarlimunum.
Eirikur Dam, tlf. 422087
Jógvan Elias á Løgmansbø, tlf. 317686
Jarvin Feilberg Hansen, tlf. 320237
Malena Arnholdsdóttir, tlf. 441395
Diana í Puntabyrgi, tlf. 316510 – fax 310557
email:
punta@post.olivant.fo

### Felagið Føroyar-Kuba
P. O. Box 2055, 165 Argir.
Tlf./fax 312098
Teldupostur:
far_cuba@hotmail.com
Viðtala eftir avtalu.

### Giktafelag Føroya
Skrivstovan er stongd í summarfrítíðini. Lýst verður tá opið verður aftur.

### Deyvafelag Føroya
Skrivstovan er opin mánadag til hósdag frá kl. 10.00 til kl. 15.00. Tlf. 31.7597, fartlf. 22.2381, skrivitlf. 31.6929 fax 31.3609 og teldupostadr. deaf@post.-olivant.fo heimasíðan: www.deaf.fo

### Cøliakifelag Føroya
Postadr.: MBF-húsið, Íslandsvegur 10C.
Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð, men samband við felagið fæst við at ringja til onkran av nevndarlimunum:
Annegreta tlf. 448664
Beinta tlf. 310574
Henning tlf. 314783.

### Nýrafelagið
Postsmoga 1063
110 Tórshavn.
Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð, men samband fæst við felagið á e-mail:
thomsen1@post.olivant.fo
Tlf. 315928, Odny
Tlf. 315786, Karin Elisa
Tlf. 315673, Katrin

### Føroya Astma/Allergifelag
MBF-húsið
Íslandsvegur 10c
Tlf./fax 311419

### Føroya Felag Móti Krabbameini
Ráðgevingarstovan er opin mánadag til fríggjadag, við telefontíð frá kl. 13-15.
Tlf. 31 79 59,
telefax 31 57 27.
E-mail:
ffk@post.olivant.fo

### Epileptikarafelag Føroya
Postadr.: MBF-húsið, Íslandsvegur 10 C. Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð, men samband við felagið fæst á tlf. 313978, Randfríð Sørensen, ella tlf. 319793, Mari Johannesen.

### Sjómansheimið Ørkin í Reykjavík
Møtini byrjaðu 1. oktober kl. 16 og verða hesa klokkutíð allan veturin.

### Føroyingafelagið í Esbjerg
Danmarksgade 25,
6700 Esbjerg,
tlf. 75132747
Opið hvørt mánakvøld kl. 19–22.00, har tú ert vælkomin at lesa bløðini, spæla kort og keypa tær ein kaffimunn.

### Føroyingafelagið í Odense
hevur opið hvørt fríggjakvøld frá kl. 20. Tú finnur okkum á Rugårdsvej 21 (kjallarin), 5000 Odense C.
Tlf.: 25395563
Teldupostur: ffo@post.gs
www.ffo.subnet.dk

## PRÓGV

Sólva Hjelm, Tórshavn, hevur tann 13. juni á Hjørring Seminarium fingið prógv sum voksenunderviser.

## SILVURBRÚDLEYP

Mánadagin 6. aug. hava vit silvurbrúdleyp, og vilja vit við hesum bjóða familju, vinum og kenningum at halda dagin saman við okkum í Bygdarhúsinum í Leirvík frá kl. 18.30 hetta kvøldið. Vinarliga sigið frá á tel. 444440 ella 212440 áðrenn 1. aug.
***Odvør og Jógvan á Lakjuni, Fuglafirði***

## EITT LJÓS Á GØTU MÍNI

### Flísin og bjálkin

*Men hví sært tú flísina, sum er í eyganum á bróður tínum, men bjalkan í tínum egna eyga verður tú ikki varur við?*
*Luk. 6, 41*

Ljósar og myrkar síður eru í okkum øllum:
-Tann, sum vit kenna vit tí góða orðinum, kann knappliga taka ill og særandi orð á tungu.
-Tann, sum so tolin hevur lagt oyra til øll harmljóð okkara, kann knappliga avdúka ótolni og vreiði.
-Tann, sum hevur troystað so mangan, kann sjálvur kenna ótta og angist í barmi.

Er tað skelkandi at møta hesum myrku síðunum í sinninum hjá øðrum - serliga hjá teimum, har vit ikki trúðu, tær funnust - so er tað uppaftur torførari at góðtaka, at tær eisini finnast í einum sjálvum.

Sálarfrøðingar siga, at tað er neyðugt at viðurkenna hetta. Tað er ein týðandi fyritreyt fyri at kunna arbeiða við teimum myrku síðunum, teimum illu tonkunum, óttanum, kuldanum, vreiðini, hjá sær sjálvum ella hjá øðrum.

Við Jesu orðum: At vera varur við bjálkan, sum er í eins egna eyga, áðrenn ein alt ov hugagóður bjóðar seg fram at taka flísina úr eyganum á broður sínum.

Menniskjað er ein syndari. Soleiðis er tann greiða myndin, vit í Halgubók fáa av okkum sjálvum, hvar vit so blaða upp og lesa. Tey fyrstu menniskjuni, Ádam og Eva, fullu í synd, so títt og knapt tey vórðu freistað. Fyri eins mans misgerð - sigur Paulus í Rómverjabrævinum - kom tað til fordømingar fyri øll menniskju. Við ólýdni hins eina mans vórðu tey nógvu syndarar.

Hann heldur tó beinanvegin í sama viðfangi fram at boða, at Guð so eisini vildi frelsa hesar neyðar syndarar. Ja, at hann sendi sín son í heimin til tess at taka upp á seg syndabyrði okkara og bera hana burtur frá Guðs ásjón, frá Guðs vreiði. Jesus kom í heimin til tess at frelsa syndarar, bæði Ádam og Evu og allar eftirkomarar teirra, bæði teg og tín næsta. "Fyri eins mans rættlætisverk er tað komið til rættvísgeringar til lívs fyri øll menniskju...Tey nógvu skulu verða rættvís við lýdni hins eina."

Tí er í lutherskum høpi hin klassiska, kristna prædikan ein prædika um synd og náði. Í hini klassisku, kristnu prædikuni verður fyrst lógin væl og virðiliga boðað, soleiðis at tú kanst verða fullkomuliga sannførdur um tína synd. Og síðani verður evangeliið boðað, soleiðis at tú kanst síggja, at tær tørvar ta frelsu, sum eina Jesus hevur vunnið tær, og koma til trúgv á hansara fullgjørda frelsuverk fyri teg.

Bjálkin verður tikin úr eyga tínum, fyri at tú kanst síggja klárt tína egnu støðu og duga at síggja - við nýggjum og mildari eygum - næsta tín og ta lítlu flísina í hansara eyga.

**Jákup Reinert Hansen**

## BRÚDLEYP

Fríggjadagin 29. juni giftust í býráðssalinum í Havn Henrietta H. Heinesen, Argir, og Sámal Jacobsen, Argir.

Í dag, 7. juli, kl. 14.00 giftast í Elim í Søldarfirði Lis Egholm, Fuglafirði, og Dánial Hansen, Glyvrum. Brúðarveitslan verður fyri innbodnum í John's Restaurant í Saltangará kl. 18.00

Í dag, 7. juli, kl. 16.30 giftast í Sjóvar kirkju Marta Tonnysdóttir Thomsen, Strendur, og Sámal Joensen, Norðragøta. Brúdleypsveitslan verður í Bygdarhúsinum á Strondum kl. 19.30.

Í dag, 7. juli, kl. 15.00 giftast í Listaskálanum Ásla Rannvá Svensson, Tórshavn, og Ási Joensen, Klaksvík. Veitslan verður í B36-húsinum fyri innbodnum kl. 19.00.

Í dag, 7. juli, kl. 16.00 giftast í Dómkirkjuni Anna T. Madsen, Kvívík, og Hans Futtrup Mikkelsen, Skave - DK. Veitslan verður fyri innbodnum í Glæmuni í Kvívík.

Í dag, 7. juli, kl. 14.00 giftast í Miðvágs kirkju Sólfríð Jacobsen og Bjørn Fjallsbak, Miðvági. Døgurði verður fyri innbodnum kl. 17.00, og vælkomst verður kl. 21.00 í Bygdarhúsinum í Miðvági.

Í dag, 7. juli, kl. 14.00 giftast í Tvøroyrar kirkju Turid Vang Jacobsen, Froðba, og Sakaris Frederiksen, Porkeri. Veitslan verður hildin fyri innbodnum í Gistingarhúsinum í Øravík.

Í dag, 7. juli, kl. 15.00 giftast í Nes kirkju Ásvør Kristiansen, Fuglafirði, og Eigil Andersen, Toftum. Døgurði verður fyri innbodnum kl. 18.00. Vælkomst verður á Svangaskarði kl. 21.30.

Leygardagin 14. juli kl. 16.00 giftast í Elling kirkju Herdis Abrahamsen, ættað úr Fuglafirði, og Johnny Back Nielsen, Elling. Brúdleypsadressan er Gærum Forsamlingshus, Elling, 9900 Frederikshavn.

Leygardagin 14. juli kl. 13.00 giftast í Vesturkirkjuni Durið Hansen og Hans Kristian Joensen, bæði úr Havn. Veitslan verður í Róðrarneystinum á Argjum kl. 19.00. Tey, ið ynskja at gleða brúðarparið við at koma, vinarliga sigið frá innan 7. juli á tlf. 319170 ella 214929.

Leygardagin 21. juli kl. 12.00 giftast í Vesturkirkjuni Sára Skylv Reinert, Havn, og Arngrím Sigurd Thomassen, Sandavági. Brúðarveitslan verður hildin í SÍF-húsinum kl. 19.00. Tey, ið vilja gleða brúðarparið við at koma, verða biðin um at siga frá á tlf. 332775, 313009 ella 004598389554 innan 11. juli.

Leygardagin 21. juli kl. 17.00 giftast í Sørvágs kirkju Tordis Nielsen, Sørvági, og Kim Lorenzen, Sønderborg. Tey, ið ætla at gleða brúðarparið við at koma í brúdleyp, biðjast vinarliga siga frá innan 7. juli á tlf. 332149 ella 321464.

Leygardagin 21. juli kl. 17.00 giftast í Havnar kirkju Katrin Bonde og Poul Kjartan Festirstein. Veitslan verður í HB-húsinum kl. 19.00. Tey, ið vilja gleða okkum við at koma í brúdleyp, verða vinarliga biðin um at siga frá á tlf. 312218, 316976 ella 318133 áðrenn 10. juli.

Leygardagin 21. juli giftast í Christianskirkjuni í Klaksvík Finngerð Sólbjørg og James Forbes Clark, Luxemburg. Vígslan verður kl. 15.00. Veitslan verður á Hotel Norð, Viðareiði kl. 19.00. Tey, ið vilja gleða okkum á hjúnabandsdegnum, verða vinarliga biðin um at siga frá, helst áðrenn 9. juli á tlf. 456423 ella 452002.

Fríggjadagin 27. juli kl. 16.00 giftast í Funnings kirkju Beinta Sivertsen, Funningur og Páll Hammer, Runavík. Brúdleypsveitslan verður í bygdarhúsinum í Leirvík kl. 19.30. Tey, ið vilja gleða brúðarparið við at koma, verða vinarliga biðin um at siga frá á tlf. 449440 ella 424555 innan 9. juli.

Leygardagin 4. august kl. 15.00 giftast í Havnar kirkju Gunnvør Olsen, Syðrugøta, og Gunnar Oluf Weihe, Tórshavn. Veitslan verður hildin í Pálsstovu kl. 19.00. Tey, ið vilja gleða brúðarparið við at koma, verða vinarliga biðin um at siga frá á tlf. 310306, 441459 ella 313897 áðrenn 21. juli. Til ber eisini at tekna seg á teldupost: geo@post.olivant.fo

Leygardagin 4. august kl. 16.00 giftast í Glyvra kirkju Bryngerð Nielsen, Saltangará, og Vegard Röstad, Berlevåg, Norge. Brúðarveitslan verður á Svangaskarði kl. 19.30. Tey, ið vilja gleða brúðarparið við at koma í brúdleyp, verða biðin um at siga frá á tlf. 449825 ella 448112 innan 20. juli.

Leygardagin 4. august kl. 15.00 giftast í Sjóvar kirkju Karina Simonsen, Strendur, og Svend Højgaard, Skála. Brúdleypið verður hildið í høllini á Skála kl. 19.00. Tey, ið vilja gleða brúðarparið við at koma í brúdleyp, verða vinarliga biðin um at siga frá á tlf. 447318, 441258, 226508 ella 224591 innan 22. juli.